# Bygdarráðið stuðlar Røkt

**Vestmanna Bygdarráð boðar í tíðindaskrivi frá, at tað tekur undir við ætlanini hjá Sp/f Røkt um at gagnnýta vind- og vatnorku**

ORKUPOLITIKKUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Bygdarráðið í Vestmanna heitir í tíðindaskrivi sínum á allar partar um at samstarva um verkætlanina, og bygdarráðið heldur, at sæð frá einum umhvørvissjónarmiði er skilabest at royna at fullnýta verandi vatnorku, áðrenn farið verður undir ætlanir, sum kunnu hava óhepna ávirkan á náttúruna.

Sagt verður, at bygdarráðið heldur, at dentur eigur at verða lagdur á varandi orkukeldur, serliga nú oljuprísurin er so høgur, tí tað er skilabest bæði samfelagsbúskaparliga og umhvørvisliga, stendur at lesa í tíðindaskrivinum, sum Vestmanna Bygdarráð sendi út mikudagin.

# Karaoke við Showmonnum verður endurtikið

Herfyri fingu fólk høvið at royna seg sum sangara við Showmonnum á REX, tá bólkurin var ein livandi Karaoke bólkur. kvøldið var øgiliga væl eydna, og REX endurtekur tí tiltakið fríggjakvøldið. So um tú hevur hug at standa á odda fyri einum av Føroya bestu bólkum, so hevur tú nú møguleikan.

Fyri áhoyrararnar verður høvi at stuttleika sær, meðan man lurtar eftir føroyskum songrøddum, sum royna seg á palli, kanska onkrar á fyrsta sinni við livandi tónleiki.

Tiltakið er skipað so, at ein listi við sangum liggur í barrini, har eru bæði góð gomul løg, og tey nýggjasta nýggju, bæði føroysk og útlendsk. Showmenn duga so at siga at spæla alt, so um júst tín sangur ikki er á listanum, skulu teir nokk duga at spæla sangin. Karaoke tiltakið er frá kl.01.00 til kl.02.30, aftaná spæla teir til dans.

**nud**







WWW.SMYRIL-LINE.COM

*Her er ein lítil lýsing av teimum trimum krógvunum gist verður á seinna túrin:*



**Norsminde Kro**

Hendan yvir 300 ára gamla krógvin varð renoverað í 2003/04, tó so, at gamli andin er varðveittur. Liggur í hugnaligum umhvørvi við fjørðin og havnina bert 20 km frá Århus.



**Roslev Kro**

Sera hugnalig krógv, ið liggur tætt við strond og skóg. Kømruni eru sera hugnalig. Eisini er golfvøllur og baðiland tætt við. Køkurin bjóðar nógvan góðan mat til einhvønn góma.



**St. Binderup Kro**

Gomul krógv í náttúruvøkrum umhvørvi millum Viborg og Ålborg. Kømrini eru hugnalig og góð og á matarskránni eru nógvir áhugaverdir rættir.

**Íroknað kostnaðin er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í egnum kamari við wc/bað og sjónvarpi. íroknað 7 gistingar á trimum ymiskum kráum við morgunmati.

Oljuavgjald á kr. 120 fyri hvønn er ikki íroknað prísin.

Tlf: 34 59 00
Fax: 34 59 50
booking@smyril-line.fo